í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein



# Alexandra heldur seg burtur

Cirkus Arena hevur avlýst sín árligu framsýningin til frama fyri Børnecancerfonden. Í fjør gav hendan framsýningin 200.000 krónur, og nú er óvist, um framsýnginin verður aftur. Alexandra – fyrrverandi prinsessa, sum nú er greivinda – var við í hesum arbeiðum, men nú vil hon halda seg burtur úr Møgeltønder, har fyrrverandi maður hennara, Joachim prinsur, hevur funnið nýggja konu.

# Vil senda Beckham aftur til Onglands



David Beckham hevur vunnið hjørtuni hjá nógvum amerikanarum, men ein av teimum, sum ikki er ovurfegin um Beckham, er sjónleikarin Mark Wahlberg, sum bý í sama grannalagi sum David Beckham.

- Hann má fara heimaftur til USA, tí eg havi støðugt paparazzi-myndamenn rennandi í mínum hava, sigur Mark Wahlberg.



# Helvtin er følsk

Næstan helvtin av øllum málningunum, sum spanski surrealisturin Salvador Dali skal hava málað, er følsk. Tað heldur ein belgiskur listakennari, sum hevur skrivað eina bók um spanska listarmannin. Stan Laurysses sigur, at Dali stóð sjálvur aftanfyri svikið og læt aðrar listamálarar málað verk í sínum navni, og Dali sjálvur legði bert sín signatur til verkini. Ein talsmaður fyri Salvador Dali grunnin sigur, at pástandirnir í nýggju bókini eru ikki sannir. Hann heldur, at talan er um lygnir fyri at gera vart við bókina.

# Meira heiður til Larsson




Sjálvur upplivdi hann ongantíð stóra áhugan fyri sínum bókum, og nú fær hann enn eina stóra viðurkenning fyri krimi-røðina Milennium. Stig Larsson doyði stutt eftir, at hann hevði latið handritið til tríggjar krimisøgur til sítt forlag. Bøkurnar um Lisbeth Salander og Mikael Blomkvist hava verið stórseljarar, og nú fær triðja bókin í røðini – Luftkastellet der blev sprængt – norðurlendsku krimiheiðurslønina, sonevnda Glaslykilin.

# Newman letur eina miliard



Kendi sjónleikarin Paul Newman er deyðssjúkur av lugnakrabba, og nú hevur hann gjørt av at lata ein stóran part av síni ogn til vælgerandi endamál. Newman skal eiga umleið eina milliard krónur, og hesir pengar skulu latast burtur til ymisk endamál. Stóra ognin hjá Newman kemur ikki orsaka av hansara sjónleikaavrikum, men framleiðsluni av salatdressingini i

Sosialurin